

# Tøkk

Øllum tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður mín, pápi og bróðir okkara

**Tórálvur Stenberg**

so brádliga varð tikin frá okkum, takka vit hjartaliga.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, berarar og sangarar, og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Argja Bóltfelag.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Haldis**
**Fróði, Jónas og Heðin**
**Hans Jacob v. fam.**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra omma,langomma, mostur og ommusystir okkara

**Tórhild Tauser**
Hvalba

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri blómur og kransar, og fyri peningagávur til Eldrasambýlið.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Familjunar vegna
**Elin, Finnbjørn og Kristianna**

## Dagurin í morgin

**28. november. Gunter.** Teir vita ikki við vissu, hvønn meint verður við. Hann stóð í halgimannatali tíðliga í tíðini, fór burturúr, men kom so seinni aftur. Teir halda tó, at hesin Gunter ella Gunterus hevur verið navnframur biskupur í Týsklandi, sum doyði í 1045, 90 ára gamal.

## Minningarorð um
# Elilju Abrahamsen



Elilja var næstyngst av børnunum hjá Onnu Malenu og Gomlustovujákup í Sørvági. Pápin var av bestu fiskimonnum, og mamman tók sær av øllum heima, og sigur tað ikki so lítið, tá hugsað verður um, hvat skuldi gerast heima tá í tíðini, og gav hon børnunum ein tryggan uppvøkstur, harafturat arbeiddi hon í saltfiski. Systkini vóru 10 í tali, og eru nú bert tvey systkin eftir.

Maðurin Poul var ættaður úr Mykinesi, so tey vitjaðu ofta til Mykinesar, har tey høvdu mangar góðar løtur, og tað sama kann sigast um okkum onnur, sum vóru og vitjaðu tey har. Elilja og Poul vóru sera nær knýtt, so tað má sigast, at tað var ein dyggur smeitur fyri hana, tá Poul andaðist. Tey fingu eingi børn, men tey tóku systursonin Jákup til sín, sum sín egna son. Hon var sera nær knýtt at Jákupi og familjuni hjá honum, og tey vóru ein dyggur stuðul hjá henni, nú hon gjørdist óhjálpin.

Sum heilt ung byrjaði Elilja at arbeiða í saltfiski. Í nøkur ár arbeiddi hon á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, og hevði hon sera góð evni at arbeiða á hesum øki, men tíverri bleiv hetta ikki hennara lívsleið, tí tá í tíðini var tað fyri tað mesta synirnir ið lærdu. Hon kom so aftur í heimbygdina at arbeiða í krambúð. Seinastu árini, áðrenn hon mátti gevast at arbeiða orsakað av heilsuávum, arbeiddi hon á flakavirkinum í Sørvági.

Sum eldri settist hon ikki hendur í favn, men fór at luttaka í ymsum tiltøkum hjá pensionistafelagnum, og hevði hon stóra gleði av hesum.

Tað sum eyðkendi Elilju var arbeiðssemi bæði úti og heima, og hon hevði handalag til mangt og hvat, og kom hetta mongum væl við. Elilja var sera barnavinarlig, so vit systkinabørn og børn okkara hava notið gott av henni.

Um ein var staddur í Sørvági, so hevði ein ringa samvitsku, um ein ikki hevði stundir at vitja Elilju, og tá ein vitjaði inn á gólvið hjá henni, var ein sera hjartaliga væl móttikin.

Tá hon bleiv millum tey fáu systkini, ið eftir vóru, trein hon inn í teirra stað í familjuni og átók sær teirra umsorgan við sínum hjartaliga sinnalag.

Nú Elilja er farin eru bert góð minnir eftir hana, og vit sum stóðu henni næst minnast hana við takksemi.

**Elmar við familju**

# Endurskinsdagurin 7. desember



**Fyri at fáa nyttu av øllum endurskinunum, sum liggja burturgloymd í heimunum kring landið, verður skipað fyri átaki fyri øllum næmingum í fólkaskúlanum**

FERÐSLUTRYGD

ENDURSKINSDAGURIN 7. desember - nú fara vit í skuffur og skáp at leita eftir endurskinum.

Endamálið er at leita fram so nógv endurskin, sum til ber og at elva til at tey verða nýtt.

ENDURSKINSDAGIN 7. desember verður funnið fram til, hvør flokkur hevur flestu endurskinini í mun til næmingar í flokkinum.

Føroya Sparikassi letur 3000,- kr. til vinnaran. Nr. 2 fær 2000,- kr. og nr. 3 fær 1000,- kr.

Norðoya Apotek:
# Nýggjur apotekari settur

TÍÐINDASKRIV

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna– og heilsumálum hevur sett Kristbjørg Isaksen úr Norðragøtu í starv sum apotekari við Norðoya Apotek í Klaksvík.

Kristbjørg Isaksen er 27 ára gomul. Hon tók prógv sum cand. pharm. í 2006 og hevur eitt stutt skifti starvast á Christianshavns Apotek í Keypmannahavn, umframt styttri tíðarskeið í lestrartíðini á apotekunum í Føroyum.

Kristbjørg Isaksen tekur við starvinum 1. desember 2006.